

*Helena Dam á Neystabø, landsstýriskvinna, vildi fegin nýta Annu Nygaard til at fáa meiri pening til mentan, men Kaj Leo Johannesen vildi ikki spæla við, og helt fyri at talentir koma fram óansæð*

# Politikkur kom í X-Factor

**Helena Dam á Neystabø, landsstýriskvinna við mentamálum, og Kaj Leo Johannesen, løgmaður, vóru eisini við á Hvonn Live og tey megnaðu bæði at gera X-Factor politiskt**

X-FACTOR
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

Vit eru øgiliga errin av Annu, sum setir Føroyar á heimskortið.

Soleiðis segði Helena Dam á Neystabø, landsstýriskvinna, tá hon slapp framat mikrofonini og Kaj Leo Johannesen fór sama veg.

– Hetta er heilt ótrúliga flott. Børnini hava glett seg, mammur og pápar, hóast páparnir ikki hava vilja innrømmað tað. Tey hava øll sett seg frammanfyri sjónvarpstólunum fríggjakvøld, segði Kaj Leo Johannesen, løgmaður, sum viðgekk, at lagið ikki var nakað serligt, tá Anna var send úr kappingini.

Helena Dam á Neystabø, landsstýriskvinna viðgekk somuleiðis, at hon var sera forharmað, at Anna ikki kom víðari.

## Mentanin bjargar Føroyum

Helena Dam á Neystabø nýtti eisini høvið at greiða frá síni meting, at evnini hjá listafólkum í Føroyum eru tað, sum skal fáa Føroyar úr kreppustøðuni, sum er í dag.

– Tað verður føroyska mentanin, sum fer at lyfta okkum úr hesi kreppuni. Eg vóni at øll fáa eyguni upp fyri tí. Eisini tey, sum sita á pengakassanum. Tað eru fólk sum Anna, sum vit skulu stuðla allan vegin, segði Helena Dam á Neystabø.

Men Kaj Leo Johannesen vildi ikki geva vantandi pengum skuldina fyri, at talentir koma fram.

– Øll hava fingið eyguni upp fyri, at vit hava ein ungdóm, sum er einastandandi. Hvør situr á pengakassanum ella ikki, so hevur tú fingið prógvað, at tað eru talentir. Og eg trúgvi ikki, at tú kanst halda einum talentið niðri. Óansæð, hvussu nógvir pengar eru, so vil eitt talent koma fram so ella so, segði Kaj Leo Johannesen.



*Fleiri fólk vóru komin inn á Hvonn at síggja Annu Nygaard, enn tað vóru tvær vikur frammanundan, tá Lars Løkke Rasmussen, forsetisráðharri, var við í Hvonn Live*



*Tá Anna Nygaard lendi í Føroyum var hon móttikin sum hetja*